klumma

Rólant Waag Dam
lesandi á Roskilde
Universitet



# Ein RUC'a í Keypmannahavn

## Hugni, herligheit og høvuðbrýggj. Sum RUC'ari er tað essensurin av lestrarlívinum í Keypmannahavn

Avgerðin var trupul, men avgerðin var røtt. Eg fór avstað. Frá Mýrivegi við Norðskála til Oehlenschlägersgade á Vesterbro í Keypmannahavn. Frá røstum fiski og garnatálg til kebab og humus.

Jú, víst var broytingin stór. Gerandisdagurin var fullkomiliga øðrvísi. Men gerandisdagurin var góður. Ógvuliga góður. Orsøkin var, at eg valdi rætt. Roskilde Universtitet var valið, og valið var gott.

RUC, sum universitetið eisini rópast, liggur skamt uttanfyri Roskilde bý. Ein hálvan tíma tekur tað, frá tí tú hevur sett í toki á Nørreport ella Hovedbanegården, til tú stendur á Trekroner station og sært mongu gulligu, faktiskt ljótu og ógvuliga lítið tiltalandi bygningarnar, sum saman mynda Roskilde Universitet.

Men hvussu er tað nú? Ein skal ikki skoða hundin á hárinum. Tað er í øllum førum galdandi fyri RUC. Køldu og lítið innbjóðandi bygningarnir eru felagsramman um eitt lestrarstað, sum hóskar ógvuliga væl til føroyingar.

Søgan hjá RUC er long og serstøk, men tað stutta av tí langa er, at á RUC er høgt til loftið og vítt til veggja. Innanhýsis kappingin um at hevda seg sjálvan, er ikki til staðar. Hevur tú eina viðmerking til kjakið, verður tú ikki avbrotin, tí á RUC valdar ein trúgv um, at einstaklingurin hevur okkurt skilagott upp á hjarta.

Fakligi parturin kring lesturin er skipaður nakað øðrvísi, enn á flest øðrum universitetum, og besti parturin er, at tú frá fyrsta degi ikki nýtist at vera fullvísur í, at tú skalt vera annaðhvørt samfelagsfrøðingur, lívfrøðingur ella sálarfrøðingur. Tað er nóg mikið at vita hvar tín áhugi er – innanfyri tað náttúruvísindaliga, samfelagsliga ella humanistiska øki. Veitst tú tað, jamen so byrja bara, tí restin verður tikið harfrá.

Og so skalt tú eisini vita, at lesturin kanska er tað, sum fyllir minst, tá tú ert lesandi. Hugni, herligheit og eitt sindur av høvuðbrýggj, eru lyklaorðini í lestrartíðini. Hvat kemur fyrst av hugna og herligtheit, er undirorðnað. Men høvuðpína kemur forrestin áðrenn høvuðbrýggj.

| Talva 1 | 2004/05 | | 2005/06 | | 2006/07 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Lesandi | Býtið | Lesandi | Býtið | Lesandi | Býtið |
| Føroyar | 576 | 39,0% | 596 | 39,5% | 598 | 39,3% |
| Danmark | 787 | 52,3% | 789 | 52,3% | 774 | 50,9% |
| Norðurlond annars | 32 | 2,2% | 28 | 1,9% | 27 | 1,8% |
| Stórabretland | 61 | 4,1% | 77 | 5,1% | 94 | 6,2% |
| Europa annars | 7 | 0,5% | 5 | 0,3% | 7 | 0,5% |
| Norðuramerika | 9 | 0,6% | 7 | 0,5% | 11 | 0,7% |
| Suðuramerika | 1 | 0,1% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% |
| Australia / New Zealand | 4 | 0,3% | 5 | 0,3% | 8 | 0,5% |
| Miðeystur | 0 | 0,0% | 2 | 0,1% | 1 | 0,1% |
| Asia | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% |
| Íalt | 1477 | 100,0% | 1509 | 100,0% | 1520 | 100,0% |

**Talva 1:**
**Danmark er framvegis nógv best umtókta lestrarlandið hjá føroyingum, Føroyar eru nr 2, men tá eru bæði stuttar og miðallangar útbúgvingar eisini taldar við. Stórabretland er nr 3, norðurlond annars eru nr 4, og USA er nú komið uppá eitt 5 pláss.**

**Talva 4:**
**Hagøtøl frá Stuðulsstovinum vísa greitt, at fleirtalið av teimum lesandi uttanlands eru konufólk. Og tá onnur tøl aðrastaðni í blaðnum vísa, at tað eru fleiri av teimum lesandi, ið ikki koma heimaftur, fæst kanska ein ábending um, hví føroyska samfelagið er í so stórum konufólkatroti.**

| Talva 4 | 2004/05 | | 2005/06 | | 2006/07 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Kvinnur | Menn | Kvinnur | Menn | Kvinnur | Menn |
| Lesandi í Føroyum | 303 | 273 | 292 | 304 | 320 | 278 |
| Lesandi úttanlands | 538 | 363 | 523 | 390 | 563 | 359 |
| Íalt | 841 | 636 | 815 | 694 | 883 | 637 |

*Lagt til rættis:*
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

# Hentar heimasíður:

***Kunning til føroyingar, ið ætla sær ella eru undir útbúgving:***
Altjóða Skrivstovan www.ask.fo
Meginfelag føroyskra studenta www.mfs.fo
Landsfelag føroyinga í útbúgving www.lfu.fo
Mentamálaráðið www.mmr.fo
Ráðgevingin fyri føroyingar í Dk www.radgevingin.dk
Yrkisdepilin www.yrkisdepilin.fo

***Hvat skal eg lesa:***
Uddannelsesguiden www.ug.dk
Karrierevejviser www.karrierevejviser.dk

***Hvussu verður mín útbúgving vigað í Danmark?***
Cirius www.ciriusonline.dk

***Peningaviðurskifti:***
Stuðulsstovnurin www.studul.fo
Taks www.taks.fo
SU www.su.dk
SAAS www.saas.gov.uk/student_support/special_circumstances/postgrad_list.htm.

***Lestur uttanfyri norðurlond:***
Ucas www.ucas.co.uk
Ansa www.ansa.no

***LLP samstarvið innan ES:*** http://ec.europa.eu/education/programmes/llp/index_en.htm